**P/F reg. nr. 6115**

# P/F NORDIKLÍV LÍVSTRYGGINGARFELAG

## ÍSKOYTISUPPLÝSINGAR/RÆTTING TIL ÁRSFRÁSØGNINA

**FYRI**

**2018**

## Upplýsingar um felagið

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag |
| Heimstaður: | Oknarvegur 5, Postboks 3048, 110 Tórshavn |
| | |
| Skrásetingarnummar: | 6115 |
| Roknskaparár | 4 |

**Nevnd**
Turið F. Arge, forkvinna
Christian Clemmensen
Árni Ellefsen
Rune Nørregaard

**Stjórn**
Brian Smedemark

**Grannskoðarar**
PricewaterhouseCoopers, Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki P/F

Arndis Poulsen
Innanhýsis grannskoðan

**Frágreiðing**

Tryggingareftirlitið hevur í sambandi við gjøgnumgongd av ársfrásøgnini 2018 álagt NordikLív at senda inn ískoytisupplýsingar til rætting av ársfrásøgnini 2018. Talan er um at rætta notu um lívstryggingaravsetingar (notu nr. 12 í ársfrásøgnini 2018), soleiðis at henda er í samsvari við §100 í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum.

Rættingin hevur onga ávirkan á ársúrslitið, samlaðu ognirnar, skyldurnar ella eginognina í ársfrásøgnini 2018.

Nota 12 í ársfrásøgnini 2018 verður eftir rættingina hendan:

| Nota | DKK 1.000 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 12 | **Lívstryggingaravsetingar/livsforsikringsforpligtelser** | | |
| | Lívstryggingaravsetingar við ársbyrjan / livsforsikringshensættelser primo | 1.770 | 1.060 |
| | Samansavnað virðisjavnan við ársbyrjan / akkumuleret værdiregulering primo | 0 | 0 |
| | Afturlítandi avsetingar við ársbyrjan / retrospektive hensættelser primo | 1.770 | 1.060 |
| | Bruttotyggingarinntøkur/ bruttopræmier | 13.876 | 12.268 |
| | Rentutilskriving / tilskrivning af afkast | -70 | 0 |
| | Tryggingarveitingar / forsikringsydelser | -2.786 | -6.150 |
| | Kostnaðir eftir tilskriving av umsitingarbonus / omkostningstillæg efter tilskrivning af omkostningsbonus | -2.583 | -2.330 |
| | Váðaúrslit eftir tilskriving av váðisbonus / risikogevinst efter tilskrivning af risikobonus | -8.223 | -3.078 |
| | Afturlítandi avsetingar við ársenda / retrospektive hensættelser primo | 1.984 | 1.770 |
| | Samansavnað virðisjavnan við ársenda / akkumuleret værdiregulering ultimo | 0 | 0 |
| | **Lívstryggingaravsetingar við ársenda / livsforsikringshensættelser ultimo** | 1.984 | 1.770 |

**Átekningar í sambandi við ískoytisupplýsingarnar/rættingina til ársfrásøgnina 2018**

**Leiðsluátekning**
Nevnd og leiðsla hevur fylgt áløgdu boðunum frá Tryggingareftirlitinum um at rætta notuna viðvíkjandi lívstryggingaravsetingum, notu 12 í ársfrásøgnini 2018, so notan er í samsvari við §100 í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum.

Ískoytisupplýsingarnir og rættingin eru hereftir partur av ársfrásøgnini 2018 og skulu lesast saman við ársroknskapinum fyri at geva eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar 2018 – 31. desember 2018.

Nevnd og leiðsla hevur í dag viðgjørt og góðkent ískoytisupplýsingarnar og rættingina til ársfrásøgnina 2018, sum eftir okkara fatan er í samsvari við §100 í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum.

Tórshavn, tann 29. august 2019

Stjórn:

Brian Smedemark

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Turið F. Arge<br>forkvinna | Christian Clemmensen | Árni Ellefsen |

Rune Nørregaard

**Átekning frá innanhýsis grannskoðara um ískoytisupplýsingarnar/rættingina til ársfrágreiðingina 2018**

Vit hava grannskoða ískoytisupplýsingarnar/rættingina til ársfrásøgnina fyri 2018 fyri P/F NordikLív. Ískoytisupplýsingarnar/rættingarnar eru uppsettar í samsvari við leiðslunar frágreiðing omanfyri.

**Grannskoðanin**
Grannskoðanin er framd sambært kunngerðini um grannskoðan av tryggingarfeløgum og fíggjarligum samtøkum, og í samsvari við altjóða standardum um grannskoðan viðvíkjandi at leggja til rættis og grannskoða.

Vit hava lagt ætlan um og grannskoða, fyri at fáa høga vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ískoytisupplýsinginum/rættingini til ársfrásøgnina fyri 2018. Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í Ískoytisupplýsnunum/rættingunum til ársfrásøgnina fyri 2018. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Okkara arbeiði hevur ikki umfatað annað arbeiði viðvíkjandi ársfrásøgnini fyri 2018, ið vit hava givið grannskoðanarátekning uttan fyrivarni ella áherðslu á viðurskifti tann 28. februar 2018.
Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ískoytisupplysginarnar/rættingarnar til ársfrásøgnina fyri 2018 í øllum týðandi eru uppsettar í samsvari við leiðslunnar frágreiðing omanfyri.

Tórshavn, tann 29. august 2019

Arndis Poulsen
Grannskoðanarleiðari

**Váttan frá óheftum grannskoðara um Ískoytisupplýsingar/rætting til ársfrásøgnina fyri 2018.**

**Til kapitaleigararnar í P/F NordikLív**
Vit hava grannskoðað ískoytisupplýsingarnar/rættingarnar til ársfrásøgnina fyri 2018 fyri P/F Nordiklív. Ískoytisupplýsingarnar/rættingarnar eru uppsettar í samsvari við leiðslunar frágreiðing omanfyri.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av Ískoytisupplýsingunum/rættingum til ársfrásøgnina fyri 2018 í samsvarið við leiðslunnar frágreiðing omanfyri, eins og innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri, at ískoytisupplýsingar/rættingar til ársfrásøgnina fyri 2018 kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Grannskoðaranin**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi Kunngerð um grannskoðan av tryggingarfeløgum og fíggjarligum samtøkum eins og altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ískoytisupplýsingum/rættingunum til ársfrásøgnina fyri 2018.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í Ískoytisupplýsnunum/rættingunum til ársfrásøgnina fyri 2018. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Okkara arbeiði hevur ikki umfatað annað arbeiði viðvíkjandi ársfrásøgnini fyri 2018, ið vit hava givið grannskoðanarátekning uttan fyrivarni ella áherðslu á viðurskifti tann 28. februar 2018.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ískoytisupplysginarnar/rættingarnar til ársfrásøgnina fyri 2018 í øllum týðandi eru uppsettar í samsvari við leiðslunnar frágreiðing omanfyri.

Tórshavn, tann 6. september 2019

PriceWaterhouseCoopers
Statsautoriseret revisionspartnerselskab

Heidi Brander
Statsaut. Revisor

Januar
Løggilt grannskoðanarvirkið P/F

Heini Thomsen
statsaut. revisor